TÍÐINDI

at illskast inn á kommununa ella TAKS fyri at rættvísgera, at eg eri gift, hóast parlagið ikki er galdandi í Føroyum? Ella skal eg bara taka skjótastu og lættastu loysnina og skriva, at eg eri støk og harvið avsanna tann mest umráðandi persónin í mínum lívi? At gera mun á fólki særir bæði fíggjarligt og kensluligt, sigur ein rørd Marita hinumegin hornið í London. Røddin er nú vorðin sárbar. Tað er greitt, at hon hevur hugsað nógv um hesar upplivingarnar. Orsakað av, at Marita og Fiorella eru í samkyndum skrásettum parlagi, hava tær eingi lógarrættindi í Føroyum. Uttan ein mannligan føroyskan hjúnarfelaga, er Fiorella bert eitt ferðafólk. Hon kann tí bert steðga í tríggjar mánaðir í Føroyum, eins og onnur ferðafólk. Eisini eru tær verri skikkaðar fíggjarliga, um tær ikki eru skrásettar sum hjúnarfelagir. Tískil hava tær eitt brennandi ynski um, at Løgtingið fer at samtykkja broytingarnar í hjúnarbandslógini. Ein broyting hevði opnað møguleikarnar hjá Maritu og Fiorellu. Tær droyma um at festa búgv í Føroyum, eins og at halda eitt stórt brúdleyp í røttum Hollywood. Nakað, sum tær ikki høvdu umstøður til, tá ið tær gingu saman í skrásett parlag fyri fimtan árum síðani.

Brúdleyp nr.2?

Marita og Fiorella hava tilvitað bíðað við at broyta teirra skrásetingarskjøl, so tær alment kunnu kalla seg hjúnarfelagar. Tær vóna, at tær kunnu giftast í Føroym, so tær loksins kunnu hýsa tí brúdleypi, sum tær ikki høvdu umstøður til í 1999.

–Tað skal vera við hvítum brúðarkjóla, brúðarbukett, ringum og einari stórari veitslu. Meira sum í ´Hollywood´ og minni sum í ´Las Vegas´ hesuferð, sigur hon grínandi.



Fiorella og Marita vóna, at tær kunnu giftast í Føroym, so tær loksins kunnu hýsa tí brúdleypi, sum tær ikki høvdu umstøður til í 1999

Tónin er aftur vorðin lættur, og ein hómar eina vón í London. Hóast hon ikki skilir teir 24 politikkarnar, sum ikki stuðla lógaruppskotinum, viðurkennir hon, at tað verður samtykt, tá ið tíðin er búgvin.

Marita og Fiorella noyðast tískil framvegis at góðtaka, at tær bert eru ferðafólk í eitt avmarkað tíðarskeið, tá tær lenda í Vágum. Tær noyðast at bíða, til tíðin er somikið búgvin, at tær at enda kunnu lata seg í brúðarklæðini og siga JA á øðrum sinni – hesuferð í Føroyum.

BORGARLIG VÍGLSA

SAMKYND SLEPPA IKKI AT GIFTAST!

Løgmaður blokerar

Samgongutinglimir hav uppskot skulu viðgeras ekur eina felags støðu tryggja, at samgongus kann bara staðfesta, a samgonguskjalinum, s

Jón Brian Hvidtfeldt

Tað verður ikki upp til hvønn einstakan løgtingslim at taka støðu út frá sini sannføring, nú málið um at broyva samkyndum at giftast borgarliga kemur til viðgerðar í løgtinginum.

Kaj Leo Holm Johannesen er avgjørdur í spurninginum, hvussu samgongan tekur móti uppskotinum frá Poul Michelsen, Rigmor Dam og Bjørt Samuelsen.

– Í samgonguni hava vit avtalað, at tá andstøðan kemur við uppskotum, ið kunnu seta samgongustevnið í vanda, so skulu hesi uppskot viðgerast í samgonguni fyrst. Min uppgáva sum samgonguseiðari er at tryggja, at vit ylgja samgonguskjalinum. Og eg kann bara staðfesta, at hetta andstøðuuppskotið er ikki við í samgonguskjalinum, sigur Kaj Leo Holm Johannesen.

Spurdur beinleiðis, um hann sum samgongueiðari er at nokta ávirkan samgongulimum at atkvøða

22. november í fjør hevði Sosialurin hetta spurnarumfar millum tingfólk –sum greitt vísti, at tingfólk ikki taka undir við uppskotinum um at lata samkynd giftast borgarliga

BORGARLIG VÍGLSA

okerar

, at andstøðu-
, sum síðani
pgáva er at
dið. Og eg
ikki partur av
m Johannesen

jonbrian@sosialurin.fo

